UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **24. mars 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08503-22**

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-149/2021 frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni, um kampusætlanina, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin í mun til ætlanina um eitt savnað kampusøki í samsvari við kampusætlanina frá 2018?
2. Er landsstýrismaðurin í ferð við at seta í verk kampusætlanina frá 2018?
3. Nær kunnu vit vænta eitt liðugt kampusøki?

Svar

Til 1 og 2: Kampusbólkurin er farin undir at fyrireika eina arkitektakapping fyri eitt universitetskampus, sum tekur støði í kampusætlanini frá 2018. Arkitektakappingin er um ein høvuðsbygning, sum skal verða miðsavnandi fyri alt Fróðskaparsetrið, og um, hvussu alt økið endaliga skal skipast.

Bólkurin viðger í løtuni, um skilabest er at gera hetta til tvær serstakar kappingar, ella um arkitektakappingin skal fevna um bæði høvuðsbygning og um skipanina av økinum, alt um somu leið.

Á Løgtingsfíggjarlógini 2022 eru 5 mió. settar av til hetta arbeiði.

Somuleiðis eru samráðingar í gongd við Tórshavnar kommunu, sum eigur part av matriklinum á Venjingarskúlanum, har kampusøkið ætlandi skal verða. Gongd er eisini í hesum málinum.

Til 3: Tað er ilt at siga, nær kampusøkið endaliga stendur liðugt, tí at ætlanin er at byggja kampusøkið í stigum. Fyrsta stig í hesum sambandi er at yvirtaka og síðan at seta í stand Venjingarskúlan, so at fleiri partar av Fróðskaparsetri Føroya kunnu húsast í sama bygningi. Harnæst verður farið undir at byggja.

Arkitektakappingin verður væntandi útskrivað í ár.

Jenis av Rana
landstýrismaður